## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Seinnapartin regn av og á. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Skrið ella stormur av norði og kavælingur, men onkur sólglotti. Hitalagið um frostmarkið.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin minkar hann vindin niður í lot av ymsum ættum, týsdagin framvegis lítil vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 4 og 8 stig.

# BP borað 1800 metrar

**Hóast nakað tarnaðir av ringum veðri gongur væl í hond hjá BP at bora á Williamleiðini á landgrunninum**

**WILLIAMBRUNNURIN**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

-Vit hava nú borað niðar á 1800 metrar, og boringin gongur sum ætlað. Hóast veðrið ikki hevur verið av tí besta alla tíðina, síðani vit settu borin í fyri góðum trimum vikum síðani, so gongur tað stútt niðureftir sigur Hjarnar Djurhuus, stjóri hjá BP.

Hann váttar, at teir dagarnar, har alduhæddin hevur verið hægri enn 8 metrar á leiðini, hevur verið neyðugt at steðga boringini. Eftir hvønn steðg tekur tað so eisini eina løtu at fáa gongd á aftur boringina. Men nú sær betri út, og BP roknar við at kunna røkka tí fyrsta málinum í brunninum fyri jól.

Portalurin skilur, at talan er um meira enn tað eina málið, ið farið verður eftir í brunninum.

Tað var 22. oktober, at BP setti á undirgrundina. Tá sagt verður, at boraðir eru 1800 metrar, so er tað frá boripallinum. Dýpið, har borað verður, er umleið 750 metrar. Sostatt eru boraðir gjøgnum undirgrundina góðir 1000 metrar.

Samlaði boriteinurin er uppá 4750 metrar.

Annars fór Atlantic Airways undir at flúgva oljufólk frá og til pallin mánadagin. Tyrlan hjá Atlantic Airways hevur júst fingið ísetta útgerð í Aberdeen, so hon lýkur trygdarkrøvini. Tað er bretska flogfelagið Eastern Airways, sum røkir flutningin millum Vágar og Aberdeen.



*Tríggjar vikur farnar, síðani borurin varð settur í*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -9 |
| Nuuk | -6 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 13 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 2 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | -4 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 5 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 18 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 10 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 7 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1004 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer eystureftir. Eitt hátrýst, 1030 hPa. yvir Onglandi stendur mestsum í stað.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Ísland fer eystureftir og kuldabrúgvin sunnan fyri Ísland verður yvir Føroyum leygarnáttina.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/11 kl. $06^{00}$ – 12/11. $06^{00}$. Hitin í gjár: 1,2°
Minsti hiti máldur í november: -7,2° - Mesti hiti máldur í november: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 11/11 kl. $06^{00}$– 12/11 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í november: 38 mm

**Tiltøk í Miðlahúsinum**

15. november
*Heilsuhjálparfelagið*

21. november
*Musikkskúlin - Big Band*

22. november
*7b í Hoyvík á hundasleðu í Grønlandi*

28. november
*Landsbankin*

FØROYABANKI
*stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum*

Lesið Sosialin -tað loysir seg

## VESTFALLSKYRRINDI

9. november Mánin longst frá jørðini
17. november Fyrra kvarter
24. november Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. Nov. | 10.21 | 22.44 | 09.21 | 21.44 | 09.36 | 21.59 | - | 12.21 | 00.58 | 13.21 | 08.36 | 20.59 |
| 16. Nov. | 11.06 | 23.28 | 10.06 | 22.28 | 10.21 | 22.43 | 00.44 | 13.06 | 01.44 | 14.06 | 09.21 | 21.43 |
| 17. Nov. | - | 12.03 | 11.03 | 23.38 | 11.18 | 23.53 | 01.28 | 14.03 | 02.28 | 15.03 | 10.18 | 22.53 |
| 18. Nov. | 00.38 | 13.12 | - | 12.12 | - | 12.27 | 02.38 | 15.12 | 03.38 | 16.12 | 11.27 | - |
| 19. Nov. | 01.46 | 14.06 | 00.46 | 13.06 | 01.01 | 13.21 | 03.46 | 16.06 | 04.46 | 17.06 | 00.01 | 12.21 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. Nov. | 07.36 | 19.59 | 10.36 | 22.59 | 11.36 | 23.59 | 10.06 | 22.29 | 11.21 | 23.44 |
| 16. Nov. | 08.21 | 20.43 | 11.21 | 23.43 | - | 12.21 | 10.51 | 23.13 | - | 12.06 |
| 17. Nov. | 09.18 | 21.53 | - | 12.18 | 00.43 | 13.18 | 11.48 | - | 00.28 | 13.03 |
| 18. Nov. | 10.27 | 23.01 | 00.53 | 13.27 | 01.53 | 14.27 | 00.23 | 12.57 | 01.38 | 14.12 |
| 19. Nov. | 11.21 | 23.42 | 02.01 | 14.21 | 03.01 | 15.21 | 01.31 | 13.51 | 02.46 | 15.06 |